


www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 12 - 2011

# Thor í Hósvík góðan leigusáttmála

Reiðaríið Thor í Hósvík kann av røttum fegnast í hesum jóladøgum. Tað hevur nevniliga enn einaferð eydnast at fáa eitt av tess framkomnu frálandaskipum ein góðan langtíðar sáttmála. Thor Alpha hevur fingið 3 ára sáttmála við eitt av heimsins størstu seismikkfeløgum, PGS við møguleika at longja sáttmálan í enn trý ár, eitt ár í senn. Gunnbjørn Joensen, stjóri í felagnum sigur við oljan.fo, at slíkur sáttmáli hevur stóran týdning, serstakliga tá talan er við eitt av teimum stóru og kendu seismikkreiðaríunum. Thor-stjórin dylur ikki fyri, at nýggjastu og serbygdu skip teirra eru nógv eftirspurd á marknaðinum. Talan er um specialskip, sokallað Seismik Support Vessel, ið eru útgjørd við teimum mest nútímans hentleikunum og veitingar- og hjálpartænastum, sum stóru seismikkskipini hava tørv á. Eitt nú kunnu tey lasta nógva tungolju, tey kunnu taka aðra manning umborð og tey arbeiða sera væl í sjónum umframt at vera bílig í drift. So tey megna so týðandi uppgávur sum bæði bunkring og manningarskifti. Alt hetta telur nógv, tá fyritøkur, sum reka seismikkskip, skulu út á marknaðin eftir hesum slagnum av hjálpar- og veitingarskipum. Thor í Hósvík hevur annars brúkt nógva orku seinastu árini til at byggja út frálandaflotan og hevur lagt seg eftir einum ávísum parti av hesi vinnu, nevniliga seismikkvinnuni. Tað hevur so eisini vist seg at vera eitt skilagott val, tí stórur eftirspurningur er eftir serútgjørdu og nýggjastu skipunum hjá felagnum, tó at seismikkbransjan í løtuni ikki er í hæddini. Tey umleið 13-14 frálandaskipini hjá Thor arbeiða í Norðsjónum, Barentshavinum, við New Foundland, í Miðalhavinumog vestan og sunnan fyri Afrika. Við skipunum eru 250 til 300 mans, harav ein triðingur eru føroyingar.